# VÁRFRAMSÝNINGIN 2020

Felagið **FØROYSK MYNDLISTAFÓLK** skipar fyri framsýningini

Framsýningin er á **LISTASAVNI FØROYA**

**Innlatingarfreist** fyri uppskotum er 6. februar 2020 kl. 19.00

**Fernisering** er fríggjadagin 6. mars kl. 16.00

**Framsýningin** er opin 6. – 30. mars 2020.

Várframsýningin er sensurerað, tvs. at ein úrvalsnevnd velur burtúr úr innkomnu verkunum. Úrvalsnevndin er samansett av listafólki, og hon skipar fyri framsýningini og velur út millum innsendu verkini. Hendan nevndin er vald millum limirnar á aðalfundi hjá felagnum Føroysk Myndlistafólk.

**FRÍTT MYNDAEVNI**
Til Várframsýningina 2020 er myndaevnið frítt, tvs. at listafólkini sjálv velja, hvat tey mynda.

Í úrvalsnevndini fyri Várframsýningina 2020 eru Ludvík á Brekku, Finleif Mortensen og Tove Askham.

*Sí vegleiðing fyri innlating av verkum á síðu 2, 3 og 4.*

# VEGLEIÐING FYRI INNLATING AV VERKUM TIL METINGAR

**HVØR KANN LATA VERK INN TIL METINGAR Á VÁRFRAMSÝNINGINI?**
Øll kunnu lata verk inn til metingar - bæði einstaklingar og bólkar. Úrvalsnevndin leggur dent á, at ALLAR listagreinar hava áhuga. Tað veri seg myndlist, installatiónslist, videolist, ljóðlist, framførslulist osfr.

**NÆR ER UMSÓKNARFREISTIN?**
Verkini skulu latast inn við telduposti, tvs. við talgildari skjalprógvan av verkunum. Teldupostadressan er *varframsyning2020@gmail.com*, og umsóknarfreistin er 6. februar 2020.

**HVUSSU NÓGV VERK KUNNU LATAST INN?**
Til ber at lata í mesta lagi 10 verk inn og í minsta lagi 3, líka mikið hvat slag av tøkni er nýtt. Videoverk og tílíkt kann eisini latast inn sum eitt leinki til heimasíðu ella líknandi. Verkini skulu ikki vera eldri enn 2 ár.

**HVAT SKAL LATAST INN SAMAN VIÐ VERKUNUM?**

Verkini skulu latast inn við telduposti. Skriva navn, bústað, tlf. og teldupost saman við einum lista fyri verkini, eins og greitt frá niðanfyri. Um talan er um prentlist ella foto í fleiri eintøkum, ber til at skriva tað á listan. Dømi:

Sára Olsen, Onkurgøta 2, 100 Tórshavn, + tlf.nr xxxxxx, teldupostadressa xxxxxxx.

| Nr | Heiti | Tøkni | Stødd | Nøgd (prent ella foto) | Prísur |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Morgun í mai | akryl | 30x40 (longd x breidd) | | 5.000 |
| 2 | Kvøld | foto | 40x40 | 5 eintøk | 1.500 |

Um tú vilt, kanst tú skriva eitt lítið petti um tankar, hugskot o.a. til verkini. Tað kanst tú gera niðri undir talvuni. Dømi:

Tankar fyri nr. 1: Litirnir eru frá einum sjáldsomum morgni.
Hugskot fyri nr. 2: Óunniligt kvøld aftan á strævnan dag. Havi arbeitt fram ímóti at lýsa kensluna í formum og litum.

**NÆR OG HVUSSU FÆR EIN BOÐ, UM VERKINI ERU ÚTVALD TIL FRAMSÝNINGINA ELLA IKKI?**

Avgerðin hjá úrvalsnevndini verður send út við telduposti. Umsóknarfreistin er 6. februar 2020, og svar verður sent út í seinasta lagi eina viku seinni.

**UM EITT VERK VERÐUR VIÐ Á FRAMSÝNINGINI, HVØR STENDUR SO FYRI UPPHEINGING/UPPSETING OG ØÐRUM Í TÍ SAMBANDI?**

Úrvalsnevndin avger, hvussu verkini verða hongd upp.

**HVUSSU ER VIÐ TEKNISKARI ÚTGERÐ?**

Listafólk, ið lata verk inn, sum krevja útgerð s.s. uppvørpu, skerm, ljóðanlegg osfr., hava sjálv ábyrgdina av hesum, og tilhoyrandi tekniska útgerðin skal latast inn saman við

verkunum. Til ber at spyrja seg fyri hjá úrvalsnevndini á teldupostadressuni varframsyning202@gmail.com áðrenn umsóknarfreistina.

**NÆR OG HVAR SKULU ÚTVALD VERK LATAST INN?**

Tey verk, sum eru útvald til Várframsýningina2020, skulu latast inn á Listasavn Føroya 2. mars 2020. Listafólkið stendur sjálvt fyri flutningi av verkunum, bæði til og frá Listasavni Føroya. Verkini eru tryggjað, meðan tey verða sýnd fram á Listasavni Føroya frá 6. – 30. mars 2020, kl. 12.00.

**UM EITT VERK VERÐUR SELT?**

Verður eitt verk selt, verður 20% av prísinum á verkinum latin felagnum Føroysk Myndlistafólk. Tískil skal hetta vera íroknað prísinum á verkunum. Peningurin verður útgoldin listafólkinum, tá ið keyparin hevur goldið alla upphæddina til Føroysk Myndlistafólk.

**ÓSELD VERK**

Óseld verk skulu heintast á Listasavni Føroya, tá ið framsýningin letur aftur, í seinasta lagi mánadagin 30. mars 2020 kl. 12.00.

**SPURNINGAR OG IVAMÁL**

Um tú hevur spurningar viðvíkjandi Várframsýningini 2020, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á *varframsyning2020@gmail.com*

Vinarlig heilsan

**Úrvalsnevndin fyri Várframsýningina 2020**

Ludvík á Brekku, Finleif Mortensen og Tove Askham